# TÍÐIN LEGG TÍNAR VEINGIR

TÚ VART TANN **SAKNAÐA** RØDDIN Í **SAMFELAGNUM**. TANN DJARVI OG **SPEIREKANDI** VÍSUSANGARIN, SUM FÓR AT **GRAVA** UPP GOMUL **SKØLD** OG GERA TEY **LIVANDI**. MAÐURIN, SUM SKULDI FÁA FÓLK AT **STEÐGA** UPP OG LÝÐA Á. EIN **SAMFELAGSREVSARI** OG EITT SENDIBOÐ HJÁ **KÆRLEIKANUM**. TÚ HEVUR **LIVAÐ**, TÚ LIVIR, OG TÚ FERT AT LIVA, SKRIVAR **STEINTÓR RASMUSSEN** M.A. Í HESI FRÆNDAKVØÐUNI TIL **HANUS G. JOHANSEN** Á 60 ÁRA DEGNUM



**Heilsan frá Steintór Rasmussen**

Hann trínur fram á pallin. Í kovboysbuksum og reyðari skjúrtu. Hesin klæni ranki kroppurin við gittara um herðablaðið. Hetta vælkenda skeggprýdda andlitið og tað gráa livandi hárið. Eitt lítið hark í mikrofonina. Skálkabrosið. Tøgnin og spenningurin. Og so tað forloysandi lagið: La la la la la laa!

Øll kenna Hanus G. Johansen. Hann, sum sang á posthústrappuni í Klaksvík, og sum politiið mátti reka burtur, tí hetta var ófriður og ólevnaður. Hesin gamli og húsvilli flipparin, sum hevur ferðast land og ríki runt, og sum hevur spælt gittar og sungið í hálvhundrað ár. Maðurin, sum bæði hevur argað og fingið tað besta fram í fólki. Trubadururin, sum brúkar náðigávu sína.

Góði Hanus! Eg trúgvi, at sangin um teg má Poul F. hava skrivað. Og tú hevur sjálvandi gjørt lagið. Tit hava báðir, sum jørðin og mánin, verið nógvar ferðir rundan um sólina. Gjøgnum vetur og summar. Í ljósum og tungum løtum. Tú hevur havt Poul F. við tær til konsertir allastaðni í Føroyum og nógvastaðni uttanlands. Men í hjartanum hevur eisini verið pláss til Hans Jacob Glerfoss, Tummas N. Djurhuus, Rikard Long, Jacob Sande, William Heinesen og fleiri av frægu skaldum okkara.

Sjálvur ert tú ikki orðasmiður, men tú hevur upplivað, lisið og sungið um tað mesta. Um einsemi, longsul og hjartasorg. Um fordómar, dupultmoral, svik, girnd og øvund. Um kenslur, gleði, eymleika og kærleika. Um Gud og fanan, Eros og Bakkus, ja, um alt samfelagið. Um rotinskap, fals og fávitsku. Men eisini um hugsandi menniskju, sum liva, skapa og elska. Og av tínum varrum gerast vísur livandi.

Tað er lívsjáttandi at skriva eina føðingardagsheilsan til tín, Hanus. Og takk fyri, vinurin, at tað ikki gjørdust minningarorð. Tú hevur livað, tú livir, og tú fert at liva!

Men ikki allir sangarar dansa á rósum. Eg minnist fyrstu ferð, eg sá teg. Hetta var eitt vetrarkvøld fyri meira enn fjøruti árum síðani. Eg var 8 ára gamal og sat og eygleiddi mammu, sum stákaðist í tí fjálga køkinum. Tá bankaði á úthurðina, og eg leyp avstað fyri at vita, hvør gesturin var. Sjokk! Har stóð ein løgin skapningur í gongini. Og hóast vit bert fingu nøkur sekund saman, so slapp myndin at festa seg. Hesin ungi maðurin við tí síða hárinum og tí eyðkenda bitinum. Men eg skilti eisini, tá tú opnaði munnin og spurdi eftir einum forsterkara, sum Páll bróðir hevði, at røddin var vinsæl og eyguni livandi.

Eg fór inn aftur í køkin, og tú gekst tína leið. Ein 18 ára gamal eydnusmiður sleipandi avstað við sínari byrðu. Kanska at hoyra og spæla Rolling Stones og The Beatles. Ella bara ígjøgnum kalda býin og út í eina villa nátt. Árið er 68, og á 62 gradum norður mala nýggjastu vinylpláturnar, og ungdómar royna at leggja oyrað at lurtitólinum fyri at hoyra tað seinasta frá Radio Luxembourg. Og meðan The Faroe Boys syngja um føroyskar sjómenn í Aberdeen, sum fáa tevatn og breyð, brýtur flower power flóðaldan um øll heimsins høv. Spurningurin er bara, hvussu leingi verjugarðarnir í Klaksvík fara at halda.

Verðin var framvegis ung, tá eg veruliga kom at kenna teg. Vit vóru nakrir unglingar, sum tordu at seta okkara frammanundan ivasama umdømi upp á spæl og fóru at vitja tað lítla og lokkandi húsið á Stongunum, sum tú átti og búði í. Árið hevur verið 1978, og eg framførdi nakrar av mínum fyrstu sangum í hesum hugnaliga frístaði. Tú vart ein góður áhoyrari, og tað var hugaligt at sleppa at syngja og framføra í tíni stovu. Men allarmest hugtakandi var kortini at hoyra tína rødd og uppliva tín persón. Livandi og nærverandi. Og deiliga kompremisleysur í hugsan og orðum. Tú hevði longu ofrað teg sjálvan og gekst tínar egnu leiðir í lívinum. Tað var eitt sindur av Jesusi í tær. Um fólk lótu seg forarga og høvdu hug at fordøma teg, so var tað nokk tí, at tey ikki vistu, hvat tey gjørdu. Tú mátti vera sterkur fyri at yvirliva. Tað hevði verið ríkiliga svárt at missa mammuna sum 12 ára gamal. Misti tú teg sjálvan burtur, reyk alt.

Tað var hart at síggja teg rýma frá øllum og flyta av landinum í 1981. Men tú slapst ikki at vera tú sjálvur á egnum matrikkli og vart at kalla friðleysur millum tíni egnu. Okkara kæri sangfuglur og bohemur flutti til Struer, og spurningurin var, um hann nakrantíð kom heimaftur. Vit hittust tó aftur summarið 1982. Vit vóru nøkur ung, sum høvdu interailað í Europa,